

Vit ynska reiðara, manning og Tórshavnar Skipasmiðju hjartaliga tillukku við nýggju **"Hansu Mariu"**. Við ynski um góðan byr í framtíðini.

Vit takka fyri at tit valdu OILWIND til veitara av spølum og hydraulikki til nýggja trolaran.

OILWIND

Pf. J. K. JOENSEN & SONUR

TEL 332 422 · Fax 333 222

Sosialurin 341800



# Eysturoyingar

## Eysturoyar Teoriskúli

**Nýtt teoriskeið byrjar mánakvøldið 25. apríl kl. 19.00**

**Tilmelding hjá:**
**Hugo Kristiansen, tel 225225**

Hugo Kristiansen, tel 225225 · Ole Lykke, tel 220972 · Jari Lykke, tel 503002

Sosialurin 341800



# Bakarasveinur

Okkum tørvar ein raskan bakarasvein. Hevur hetta tín áhuga so ring og spyr eftir Jóhan B. Vilhelmsen ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 31 10 60

frants restorff



# Skotskar/-hollenskar kýr

**til sølu frá Danmark.**

Kýr við kálvi, neyt og nakrir tarvar eru til sølu.

Setið tykkum í samband viðokkum og fái eitt tilboð.

**Elen og Jørn Ohre**
**0045 75267291 ella 0045 40167291**
www.agervigcattle.dk
mail: sales@agervigcattle.dk


Lesið Sosialin -so eru tit við!


PM

# Til goymslu okkara

sóknast vit eftir røskum, fyrikomandi og álítandi fólki. Arbeiðið umfatar ordraavgreiðslu, útkoyring og annað goymsluarbeiði.

Fyri tann rætta kann hetta gerast eitt trygt og spennandi framtíðarstarv.

Tá heilsøluyrki verður alt meira specialiserað hava umsøkjarar við matvøruvitan og/ella møguligum royndum innan catering- og/ella bakaraøki fyrimum.

**Førleikakrøv:**
- Umsøkjarar skulu hava stóra koyrikortið.
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt og skipað.
- Hava yvirlit.
- Kunna ganga inn í eina vaktarskipan, sum m.a. eisini kann umfata náttararbeiði.

Skrivlig umsókn við prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til P/f Poul Michelsen, Postrúm 200, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi 6. mai 2005.

Um tørvur er á meiri kunning um starvið, ber til at ringja til P/f Poul Michelsen á tlf. 31 46 50 og tosa við Christian Danielsen.

**P/f Poul Michelsen**



## Heimarøktin í Suðurstreymoy søkir eftir

# bólkaleiðara

Talan er um eitt avloysarastarv í uml. 5 mánaðar til 31. august 2005. Ynskiligt er at umsøkjarin kann byrja skjótast gjørligt.

Førleikakrøvini til bólkaleiðara í Heimarøktini er útbúgvin heilsuhjálpari ella heilsurøktari við 2 ára røktarfakligum royndum.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðaran á telefon 317249.

Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag frá kl. 7.30 til 15.30.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og arbeiðsváttan verður at stíla og senda til:

**Heimarøktina, øki 1**
Att.: Anna Maria Oskarsson
Skálatrøð 14,
FO-100 Tórshavn

Tilskila: umsókn.

Umsóknarfreistin er 10. mai 2005.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Umhvørvisdagar

**Fríggjadagin 29. og leygardagin 30. apríl 2005**

Umhvørvisdagarnar fara øll út í náttúruna at rudda. Skótar, ítróttafeløg, onnur feløg o.o. stuðla hesum tiltaki við at rudda hvørt sítt øki.

Kommunan heitir eisini á onnur, um at rudda frí- og felagsøkir.

Dagarnir eru ikki ætlaðir at rudda kjallaran, bilhús ella loft. Tílíkt burturkast kann beinast á Endurnýtsluna aðrar dagar.

Skiljing í ruskbólkar til Endurnýtsluna:

**Rusk at brenna**
Viður, plastikk, gummi, flamingo, pappír og papp.

**Jarn og metall**
Hegn, jarnrør, billutir, súkklur og ymsir jarnlutir.

**Rusk at tyrva**
Kloakkrør, takrennur, impr. Viður, bjálving, asbest, glas og leirvørur.

**Dálkandi burturkast**
So sum akkumulatorar, máling, imp. viður, PVC o.a. skal leggjast og avhendast fyri seg á Endurnýtsluni ella á bingjuplássunum.

Rusksekkir fáast ókeypis á Endurnýtsluni og á hesum bingjuplássum:

**Á Endurnýtsluni á Hjalla**
fríggjadagin kl 8.00-20.00
Leygardagin kl 8.00-18.00

**Óðinshædd, Skálatrøð, Løgmannabreyt við fótbóltsvøllin, á parkeringsplássinum við Handilskúlan, á parkeringsplássinum í Støðlagøtu á Argjum.**

fríggjadagin kl 8.00-20.00
leygardagin kl 8.00-18.00

**Í Norðradali, Kaldbak, Kollafirði, Hestoy og Nólsoy**

Posar verða lagdir við bingjurnar

**Í Syðradali**
Posar verða bornir út

**Í Kaldbak**
Posar verða lagdir við bingjurnar við skúlan

Í Kollafirði á bingjuplássinum
Fríggjadagin kl. 13.00-17.00
Leygardagin kl. 8.00-18.00

